## Fyrilestur á Klaksvíkar bókasavni

Hóskvøldið 15. november kl. 19.30 heldur Rúna Hjelm fyrilestur við heitinum »Við Skálaberg í Barentshavinum – upplivingar og gransking«. Í november í 2006 slapp Rúna Hjelm sum mannskap umborð á Skálaberg. Hetta var eitt gylt høvi hjá henni, sum granskari at koma tætt at lívinum hjá sjómonnum umborð á einum av okkara mest framkomnu trolarum. Í fyrilestrinum hóskvøldið fer Rúna Hjelm at lýsa tilknýti hjá føroysku fiskivinnuni til fiskivinnusamfelagið. Ein partur av tí føroysku innuløgumentanini er siðurin at fáa til vega og býta út grams. Siðurin við at gramsa verður lýstur sum eitt dømi um samanrenningina millum sjógv og land.



# – Eg fegnist um góðu go

**Tey, sum halda, at Óli Hammer í dag er ein bittur maður, taka púrasta feil. Tað er hann ikki, og eingin er fegnari enn hann um, at stóra hallið hjá Smyril Line tey fyrstu árini við nýggja skipinum nú er vent til avlop. Síðan hann fór úr starvinum sum stjóri eftir 22 ár í hesum starvi, hevur hann verið nevndarformaður í Smyril Blue Water, og tað er hann framvegis**

25 ÁR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vit sessast inni í kamaranum hjá Óla Hammer og konuni Marthu ein av túrunum til Danmarkar við Norrønu. Kamarið er rúmsátt, og har er meira enn sengur og lítið borð. Softa og góðir stólar eru eisini at sita í. Hetta er eitt av teimum góðu kømrunum umborð. Óli, sum í dag er 63 ára gamalur, sigur, at við í ferðalagnum eru hann, konan og verdóttir við tveimum smágentum.

Tíðin til prát í hesum umfari er ikki óendaliga long, tí um ein ella tveir tímar eru vit í Hanstholm.

– Jú, enn havi eg nakrar fyrimunir umborð, og eg plagi at vera inni á kamarinum sum longst, tá vit nærkast landi, sigur Óli og smílist.

### Hann er ímyndin

Í nógv ár var Óli Hammer skipari í føroyskari innan- og uttanlandssigling, og í meira enn 22 ár var hann stjóri í Smyril Line.

Tað er tí ikki at taka munnin ov fullan at siga, at hann hevur verið ímyndin hjá okkum føroyingum at reisa á føtur ta uttanlandssigling, sum vit hava havt gjøgnum fleiri ár og framvegis hava í dag.

Hann var høvuðsmaðurin aftanfyri stovnanina av Smyril Line, sum hevði 25 ár á baki 1. november í ár, og komandi summar verða 25 ár, síðan felagið keypti fyrstu Norrønu.

Óli hevur verið ein slóðari, og hann var av sonnum pionerurin á sínum øki.

Vit plaga at siga um pionerarnar, at teir eru frammanfyri sína tíð. Men var eingin fyrstur, høvdu vit mangan verið seinir á sjóvarfallinum, eisini í vinnuligum høpi.

Men tað hevur ikki altíð verið lætt at verið tann, sum slóðaði fyri, og tað hevur ikki altíð verið lætt at verið Óli Hammer.

Nýggja Norrøna var ein veldug íløga og eitt stórt tak, og byrjanin kundi illa gingið verri við fleiri óhappum, sum kostaðu felagnum dýrt. Hvussu pionerurin hevði tað tey fyrstu tungu árini við stóra og stásiliga skipinum, kunnu vit bara ímynda okkum.

### Slett ikki bittur

Í 2005 var tíðin liðug hjá Óla Hammer sum stjóra í Smyril Line, men hann er ongantíð dottin langt burtur frá felagnum. Tá stjóratíðin var úti, gjørdist hann nevndarformaður í Smyril Blue Water, sum er flutningsfelagið, ið tekur sær av farmaflutninginum.

Tey, sum halda, at Óli Hammer í dag er ein bittur maður, taka púrasta feil. Tað er hann ikki, og eingin er fegnari enn hann um, at stóra hallið hjá Smyril Line tey fyrstu árini við nýggja skipinum nú er vent til avlop.

– Tá eg fór frá sum stjóri í Smyril Line, høvdu vit júst fingið eina fíggjarliga loysn fyri felagið, og tá høvdu vit eisini fingið ein leist, sum gjørdi, at útlitini hjá felagnum sóu betur út. At eftirtíðin vísti, at loysnin kortini ikki rakk heilt á mál, er so tað.

Hann vísir á, at tey fyrstu tvey árini við gomlu Norrønu eisini góvu hall, men triðja árið hevði felagið avlop.

– Við nýggju Norrønu góvu trý tey fyrstu árini hall, men síðan stóð upp og niður, sigur Óli.

Hann heldur, at kemur einki óvæntað hóttafall á hjá skipi og reiðarii, sum felagið ikki kennir í dag, skuldi felagið verið komið burtur úr fíggjarligu trupulleikunum.

– Tað er eingin fegnari um hetta enn eg, sigur fyrrverandi stjórin í Smyril Line.

Óli vísir á, at felagið hevur tríggjar høvuðsinntøkur. Tann fyrsta er sølan av ferðaseðlum, onnur er sølan umborð, og hin triðja er farmaflutningurin.

– Nú gongur nógv betur á øllum "frontum", sum hann tekur til.

### 25 ár á baki

Á allahalgannadegi 1. november 1982 varð Smyril Line stovnað við Alberti Mortensen sum nevndarformanni.

– Orsøkin til, at vit fóru í gongd, var, at politiski myndugleikin hevði spælt fallit, og spurningurin um føroyska uttanlandssigling kostaði eitt landsstýri. Hetta var sonevnda Lassa II-málið, sum Óli tekur til.

Eftir at nýggj samgonga varð skipað, og nýtt landsstýri kom til, vildu hesi stuðla keypi av einum skipi, treytað av, at felagið var privat.

– Eitt annað, sum gjørdi, at vit fóru í gongd, var, at vit hoyrdu, at íslendingar høvdu leigað skip, sum skuldi setast í sigling várið eftir. Hetta var eisini viðvirkandi til, at vit komu upp úr stólinum.

Óli vísir á, at um íslendingar tá komu við einum góðum nútímans skipi, hevði góði gamli Smyril ivaleyst havt lítlan kjans at staðið seg í kappingini.

– Eg førdi Smyril í átta ár – frá tí, at hann kom til landið, til eg gjørdist stjóri í Smyril Line.

Hann sigur, at tá ið Smyril kom í 1975, var málið í fyrsta lagi at fáa eina betri ferju til Suðuroyarsiglingina.

– Fyri at fáa meira pening í kassan, varð skipið eisini sett í millumlandasigling um summarið, fyrst yvir á



*– Tá eg fór frá sum stjóri í Smyril Line, høvdu vit júst fingið eina fíggjarliga loysn fyri felagið, og tá høvdu vit eisini fingið ein leist, sum gjørdi, at útlitini hjá felagnum sóu betur út, sigur Óli Hammer, sum var stjóri í Smyril Line í meira enn 22 ár*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*